# Amerikanskir múrar kunnu falla

**Nú Barack Obama vann amerikanska forsetavalið, bendir okkurt á, at ávísir tolsemismúrar kunnu falla og geva afturljóð í restini av heiminum, metir Herman Oskarsson, viðmerkjari**

AMERIKANSKUR POLITIKKUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Múrar, sum kunnu geva afturljóð um allan heim, fella møguliga, nú Obama er nýggjur forseti. Hetta metir Hermann Oskarsson, politiskur viðmerkjari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Nógvir ymiskir forsetar hava sitið við valdið, men kortini hevur USA altíð verið USA, staðfestir Herman Oskarson, viðmerkjari og búskaparfrøðingur, sum er sera ivandi um stóru broytingarnar, ið nógv vænta av Barack Obama.

Tó eftir eitt greitt val, bendir ymiskt á, at nýggjar røddir verða at hoyra

### USA slóðar fyri

Undan amerikanska valinum væntaðu Herman Oskarson, viðmerkjari, ikki, at tað fór at fáa stórvegis týdning, hvør av teimum báðum forsetavalevnunum fór at vinna valið. Politikkurin hjá John McCain og Barack Obama líkist nógv, og óansæð hvat, so gongur USA sína egnu leið, staðfesti Herman Oskarsson. Hann ivaðist til dømis ikki í, at uttanríkispolitikkurin hjá Amerika enn fer at nýta hernaðarmegi at fremja egin áhugamál, sum til dømis við Irak-krígginum.

So at siga, allur heimurin hevur við ídni fylgt við í amerikanska valstríðnum. Men tá stóri munurin á valevnunum ikki er uttanríkispolitikkurin, hví man heimurin vera áhugaður í amerikanskum innanríkispolitikki?

Tað er ein sannroynd, at rák í Amerika ávirka allan heimin, tí um Amerika loyvir ella noktar einhvørjum, hendir tað ofta, at onnur samfeløg fylgja sama leisti.

- Konservativ kristin hava sitið við valdið í USA í so mong ár, at kanska gevur broytingin hinum partinum eina vón. Til dømis tora tey, ið ynskja samkynt parlag, kanska betri at traðka fram nú. Kanska fellir ein tolsemismúrur í Amerika, í so máta, eg veit ikki, sigur Herman Oskarson.

USA flytir seg eisini

Hóast nógv lond nýta Amerika sum fyrimynd, nýtir Amerika eisini, til dømis, Evropa sum fyrimynd á ymsum økjum.

- Búskaparpolitikkurin í Evropa hevur verið ein fyrimynd hjá fleiri konservativum búskaparfrøðingunum. Nú kann væntast at USA fer at líkjast Evropa á fleiri slíkum økjum. Fólkið hjá Obama kann fara at hyggja enn meira eftir Evropa, tá avgerðir verða tiknar hetta skeiðið, sigur Hermann Oskarsson.

Sostatt ivast hann stórliga í síni útsøgn fyri valið, har hann ikki metti valið fara at hava nakra ávirkan uttanfyri Amerika.

- Tað er sum við Berlinmúrinum á sinni, tað óvæntaða kann henda; man skal ongantíð siga ongantíð.

## Heimurin fylgdi við

**Á heimasíðuni www.iftheworldcouldvote.com, á føroyskum »Um heimurin kundi atkvøtt« nýttu 868.144 heimsbúgvar úr 213 ymiskum londum, høvið at siga sína hugsan, við at atkvøða fyri øðrum av valevnunum. Her vann Barack Obama eisini, sera stórt 87,3% móti 12,7%. Úr Føroyum komu 150 atkvøður, har heil 93,3% av teimum fullu á Obama.**

